Hoyringssvar frá Etiska ráðnum - Uppskot til løgtingslóg um framtíðarfulltrú

Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð <Arnbjorn@er.fo>

Fre 18-06-21 19:17

Til: Almannamálaráðið <amr@amr.fo>

Etiska ráðið takkar fyri, at tað er boðið við sum hoyringspartur í hesum máli. Etiska ráðið hevur hesar viðmerkingar:

At hava fleiri framtíðarfulltrúar: Etiska ráðið sær fyrimunir við at kunna hava fleiri framtíðarfulltrúar, men heldur, at hædd eigur at verða tikin fyri tí vandanum, at framtíðarfulltrúarnir kunnu verða ósamdir, um fulltrúirnar fevna um somu viðurskifti. Tí kundi verið umhugsað at nágreina umráðini hjá hvørjum framtíðarfulltrúa, so at slíkar støður ikki kunnu koma fyri.

Um myndugleikan hjá framtíðarfulltrúanum: Víst verður á vandan í, at framtíðarfulltrúin hevur heimild til at taka stórar avgerðir, sum røkka langt inn í framtíðina. Ongin kennir framtíðina, og tí eigur fulltrúarveitarin at hava trygd fyri, at framtíðarfulltrúar ikki taka avgerðir, sum binda fulltrúarveitaran órímiliga, skuldi støðan verið munandi broytt, og fulltrúarveitarin velur at taka aftur framtíðarfulltrúina.

Eftirmeting av skipanini: Skipanin við framtíðarfulltrú er sum skilst nýggj í Norðurlondum, og tí heldur Etiska ráðið, at tað eigur at verða ásett, at skipanin skal endurskoðast eftir nøkur ár, kanska regluliga.

Etiska ráðið hevur ikki aðrar viðmerkingar.